

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 05 - 2012

# BP setir trygdina í hásæti millum Hetland og Føroyar

Bretski oljurisin BP, sum er mest virkna oljufelagið vestan fyri Hetland, hevur nú bílagt fýra serútgjørd útgerðar- og hjálparskip til oljuleiðirnar nær føroyska markið. Hesi skipini (Platform support vessels, PSV) skulu røkja fleiri av pallunum og framleiðsluskipunum hjá BP í økinum í norska partinum av Norðsjónum. Hesir sáttmálar koma eftir, at BP hevur gjørt av at menna sítt virksemi eitt nú vestan fyri Hetland komandi árini. Skipini verða latin í 2013 og 2014. Nýggju skipini, sum eru útgjørd við tí allarnýggjastu tøknini, fara at gera arbeiðið meira effektivt og trygt og harvið liva upp til nýggja trygdarpolitikkin hjá BP eftir vanlukkuna í Meksikanska flógvanum. Skipini eru útgjørd til at kunna taka sær av dálking og hava serstakar tangar at brúka í eini dálkivanlukku. Við hesum nýggjum útgerðar- og hjálparskipunum vil BP av álvara vísa, at tað setir trygdina í hásæti, ikki minst har tað arbeiðir á djúpum vatni í veðurbardum havøkjum so sum millum Hetland og Føroyar. Fyri at ganga trygdini á møti gongur BP enn eitt stig víðari og hevur gjørt langtíðar setanaravtalur við manningarnar fyri at minka um útskifting av manning ov oftani. Trevor Garlick, stjóri hjá BP í Norðsjónum og vestan fyri Hetland sigur, at stóru og langtíðar íløgurnar hjá BP eitt nú vestan fyri Hetland hava fingið felagið til at brúka meira pengar og orku uppá at gera munandi íløgur í trygdartænastur av ymsum slag. Hesi fýra nýggju skipini fara at geva BP fyrimunir bæði innan trygd og rakstur. Hesar íløgur eru eisini partur av málinum hjá BP at fáa meira burtur úr verandi oljukeldum. Íløgurnar eru eisini góð tíðindi fyri Skotland og Norra, nú 80% av arbeiðinum uppá eitt nýggju skipini, fara at liggja har. Manningarnar fara at vera úr Noregi og Skotlandi. Partur av hesum er eisini at leggja størri dent á at útbúgva fólkini til tær ymsu maritimu tænasturnar, alt við tí fyri eygað at skapa betri trygd og at at kunna spara útreiðslur. Skipini fara so at hava